

Roynt verður at fáa Kvitbjørn av flúrinum aftur.

# Nýtt føroyskt skip fór á land í Noregi í morgun

**Jógvan Hugo Gardar**

28.06.2015 - 12:56

Oljan.fo

DAGFØRT: Í morgun rendi gassrikni Kvitbjørn á ein flúr uttanfyri Skeide í Sunnmøre. Hetta er í Mið-Noregi.

Royndin at fáa Kvitbjørn av flúrinum miseydnaðist fyrrapartin, men roynast skal aftur tá flóð verður aftur, skivar Vikebladet.

Sum skilst fór Kvitbjørn á land undir hægstu flóð, og tí stendur skipið rættuliga fast á flúrinum, og vón er eftir øllum at døma ikki fyri at fáa skipið av flúrinum aftur fyrrenn í fyrsta lagið umleið klokkan 21 føroyska tíð í kvøld.

Ikki er greitt hví Kvitbjørn rendi á land, men sambært Vikebladet var skipið farið langt av kós. Stjóri í reiðarínum DSD, Ingvald Løyning, sigur sambært Vikebladet at talan helst er um okkurt tekniskt sum ikki hevur rigga sum tað skal. DSD eigur NorLines.

Kvitbjørn er fyrsta av sínum slag sum verður rikið við gassi, og heimstaðurin hjá skipinum er Tórshavn. Eigararnir eru norska reiðaríið NorLines. Skipið bleiv doypt 16. apríl í ár.

Kvitbjørn siglir við góðsi millum Norður-Evropa og Noreg.